# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um bróstkrabba

**Sjúkueyðkenni, ið skulu geva illgruna um bróstkrabba**

**Um eitt ella fleiri av sjúkutekin nevnd niðanfyri eru tilstaðar, skal ávísast til krabbaútgreining**

- Palpatoriskt illgrunasom ífylla (hørð, ógreið avmarking og fikserað til íkringliggjandi vevnað húð ella fasciu) Allar nýuppdagaðar ífyllur hjá postmenopausalum kvinnum eru illgrunasamar
- Nýtilkomin papilretraktión
- Nýtilkomin húðinntrekking
- Papil-areola eksem/ulceratión (OBS Mb. Paget)
- Kliniskt illgrunasamir eitlar í axillu
- Suspektar broytingar við myndadiagnostikki (mammografi ella onnur radiologisk kanning)
- Biopsiváttaðar aksil metastasir

  - Ver serliga ansin við kvinnum í viðgongu ella sum geva bróst, um nevndu sjúkutekin eru tilstaðar

**Handfaring av recidiv og nýggjur tilburður av bróstkrabba**

- Í uppfylgingartíðarskeiðnum (fyrstu 10 árini) - onkologisk deild LS
- Eftir uppfylgingartíðarskeiðið - ávísing til nýggja krabbaútgreining

**Ávísingin**

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um bróstkrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026